# Dagar og nøvn í álmanakkanum í nýggjari og størri útgávu

Fyri fjúrtan árum síðani skrivaði Axel Tórgarð bókina um dagar og nøvn í okkara álmanakka. Síðani hevur hon verið ein hent handbók hjá mongun.

Hon verður dúgliga nýtt hjá tíðindamonnum, men har kemur innihaldið í henni bara fram í pettum fyri hvønn dagin. Mong eru tey, sum seta spurningar til ávísar dagar, sín egna føðingardag ella føðingardagar hjá onkrum avvarðandi. Tá er bókin hent at hava við hondina, og er hon tí ein av teimum bókum, sum koma væl við alt árið – og ikki bert á jólum!

Lítið er tí at undrast á, at bókin skjótt varð útseld, og nú hevur hon ikki verið at fingið í mong ár. Tørvur er tí á nýggjari útgávu, og nú er hon so her.

Umframt tað, sum stóð í fyrru útgávu av hesi bók, hevur Axel gjørt eitt stórt kanningararbeiði fyri at fáa nakað at vita um teir stóru dagarnar í føroyska álmanakkanum, um messur og vøkur og søkur sum bara føroyingar hava kunnleika um. Hetta legði hann fram í mongum útvarpssendingum sserliga í áttatiárunum. Spell hevði verið, um alt hetta tilfar fór í gloymskuna, og tí er ein partur av hesum tikið við í nýggju útgávuni, soleiðis at tað ber til hjá teimum, sum hava serligan áhuga í einum ávísum degi, at fáa hollan kunnleika um hvat ið liggur aftan fyri navn dagsins.

Fyri at lætta um hjá lesarunum at finna fram til hvar ið ávís nøvn og dagar eru viðgjørd, er í hesi bókini ein stílur, eitt indeks, sum er stórt í vavi. Hetta ger bókina enn meir nýtiliga sum handbók.

Bókin, sum forlagið Stiðin gevur út, er heft og síðutalið er 240.




*Vit her á blaðnum brúka bókini hjá Axeli Tórgarði hvønn dag, og tað sæst eisini á permuni*










